## Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjaldsskattalógina og skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðurøki, Miðøki og Suðurøki halda til í ávikavíst Saltangará/Klaksvík, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Norðurøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 35 starvsfólk.

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

# Deildarleiðari

**Vit eru ein stovnur á flogi, tí leita vit eftir einum deildarleiðara til eftirlitsdeildina á Norðurøkinum, sum kann halda kósina.**

Sum nakað nýtt eru vit fyrsti stovnur í almennum høpi, sum hevur undirskrivað mál- og avrikssáttmála. Vit taka við hesi avbjóðing.

**Vit vænta at tú:**
- hevur útbúgving frá hægri lærustovni, so sum Cand. Merc., HA, HD, ella líknandi
- hevur fakliga vitan, sum er grundarlag undir eini dygdargóðari tænastu
- vil støðugt menna hesa vitan og er fleksibul í tínum arbeiðslagi og viðurskiftum við starvsfólk og samstarvsfelagar
- dugir væl at samstarva og hevur vilja og førleika at vera góður leiðari
- er før/ur fyri at samskifta í talu og skrift á enskum og norðurlendskum.

**Arbeiðsuppgávurnar eru:**
- daglig leiðsla av eftirlitsdeildini, herundir kolvetni at íverkseta mál og avriksstýring og at hava ábyrgd av at mál verða rokkin
- at gera virðisgrundarlag okkara virkið
- samstarv við virkir, stovnar og einstaklingar.

**Vit kunnu bjóða:**
- fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði í nýggjum bygnaði, har tú hevur møguleika at ávirka arbeiðsgongdina
- fakligar avbjóðingar og møguleikar fyri eftirútbúgvingum
- flextíð

**Kennir tú teg aftur:**
Kennir tú teg aftur í hesum og hevur áhuga at arbeiða saman við okkum og flyta stovnin inn í framtíðina, so vænta vit at tú sendir okkum eina umsókn.

**Setanartreytir:**
Setanarøkið er Norðurøkið, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir:**
Fleiri upplýsingar fært tú við at venda tær til Ingolf Lamhauge, økisstjóra á tlf. 352600.

**Umsóknarfreist: 18.10.2007**
Send umsókn við avriti av prógvi og upplýsingum um útbúgving og starvsroyndir til:

**Toll- og Skattstova Føroya**
Norðurøki
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

**ella til tollskatt@tollskat.fo**

**Stílað: Ingolf Lamhauge, økisstjóri**

*Vit vísa vælvild, áhuga og virðing og gera okkara besta fyri at menna eitt opið og nærverandi samskifti!*





# Samskipari til Amnesty

Av tí at samskipari okkara hevur valt at taka við nýggjum avbjóðingum, verður søkt eftir nýggjum samskipara til Amnesty International Føroya Deild.

**Arbeiðsuppgávur**
Vit sóknast stutt sagt eftir eini eldsál, sum brennur fyri mannarættindaspurningum og sum hevur hug og hegni at standa fyri dagliga arbeiðinum hjá Amnesty International Føroya Deild.

**Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:**
- at planleggja og gera langtíðarætlanir fyri deildina,
- at samskipa og fyriskipa átøk og tiltøk,
- at umboða deildina heima og í altjóða høpi,
- at økja um og tryggja inntøkugrundarlagið,
- at røkta heimasíðuna og gera kunningartilfar.

**Vit bjóða eitt starv, sum:**
- gevur møguleika at arbeiða við mannarættindum,
- gevur pláss fyri nýskapan og øðrvísi hugskotum,
- er sjálvstøðugt og avbjóðandi við nógvum samskifti úteftir,
- gevur altjóða royndir.

**Førleiki**
Vit rokna við, at tú - umframt at hava hug at arbeiða miðvíst fyri mannarættindum - hevur
- góð samskipingarevnir og góð samstarvsevnir,
- dugir væl at samskifta munnliga og skrivliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum,
- hevur góðan kunnleika til teldunýtslu,
- hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni.

Royndir frá líknandi starvi eru til fyrimuns, tó ikki ein treyt!

**Lønar- og setanartreytir**
verða at avtala samsvarandi royndum og førleikum. Starvið er fulltíðarstarv og verður sett frá 1. november ella skjótast til ber. Starvið er fyribils tíðaravmarkað til eitt ár. Roknast má við nakað av ferðing uttanlands.

**Meiri fæst at vita**
við at venda sær til Margrethu Nónklett, samskipara, á tel 315816 ella umvegis teldupost mnonklett@amnesty.fo.

**Umsóknir**
Freistin at søkja er 24. oktober 2007. Umsóknir við grundgevingum, prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu stílast til:

Amnesty International, Føroya Deild
Hoydalsvegur 6, 100 Tórshavn

Ella umvegis teldupost:
amnesty@amnesty.fo

www.amnesty.fo

Sjónband 317774



## HÚS Á GARÐAVEGNUM

Um hóskandi boð fæst, eru eini hús á Garðavegnum í Klaksvík til sølu.

Húsini eru 96 m² í 2 hæddum.

Húsini eru nýumvæld innan í 2005-2006 við t.d. nýggjum køki, bað og gólvum

**Tlf. 210689**



Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin